

*Higartil í ár hevur Havsbrún tikið ímóti umleið 270.000 tonsum av ídnaðarfiski ímóti 250.000 tonsum síðsta ár.*
*- Verkfallið tíðliga í summar kostaði okkum sløk 60.000 tons, sigur stjórin, Bergur Poulsen.*

*Mynd: Jan Müller*

# Havsbrún fær væl av svartkjafti

**Fyrst í hesi vikuni landaðu fýra íslendskir og tríggir føroyskir bátar til Havsbrún í Fuglafirði.**
**- Vórðu vit ikki raktir av verkfalli tíðliga í summar, høvdu samlaðu nøgdirnar higartil verið sløk 60.000 tons fleiri, sigur stjórin á Havsbrún, Bergur Poulsen**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sunnudagin og mánadagin landaðu fýra íslendskir bátar, Svanur, Beitir, Askell og Hofell, ídnaðarfisk til Havsbrún í Fuglafirði.

Bergur Poulsen sigur, at íslendsku skipini, sum hava roynt í føroyskum sjógvi, høvdu eini 3000 tons av svartkjafti tilsamans.

Nøkur føroysk skip hava eisini landað til Havsbrún fyrstu dagarnar í vikuni.

Krúnborg landaði 800 tons mánakvøldið, Kristian í Grótinum kom á middegi týsdagin við 1800 tonsum, og týskvøldið kom Norðborg við 800 tonsum.

Hvussu verður teir næstu dagarnar, dugdi Bergur ikki at meta um, tá ið vit frættu fyrrapartin í gjár.

- Skipini hava øll roynt vestan fyri í føroyskum sjógvi. Væl hevur verið at fingið, men síðan hann øtlaði veðrið, er minni komið burtur úr.

Í síðstu viku keypti Havsbrún eisini væl av svartkjafti frá føroyskum og íslendskum skipum.

Spurdur, hví íslendsku skipini landa í Føroyum, sigur Bergur, at tað í fyrsta lagi er stutti teinurin til lands, nú svartkjaftaskipini royna vestanfyri Føroyar.

Í fjør keypti Havsbrún umleið 250.000 tons av ídnaðarfiski, og høvdu vit ikki havt verkfall á privata arbeiðsmarknaðinum tíðliga í summar, hevði árið 2003 verið rættiliga gott hjá virkinum í nøgd.

- Vit mistu sløk 60.000 tons av ídnaðarfiski í summar, meðan verkfall var. Soleiðis, sum gongdin annars hevur verið í ár, høvdu vit langt síðan havt fingið somu nøgd sum í fjør. Men verfallið rakti okkum sera meint.

Bergur Poulsen sigur at enda, at higartil í ár hevur Havsbrún keypt eini 270.000 tons av ídnaðarfiski, og væntandi koma samlaðu nøgdirnar uppá eini 280.000 tons, tá ið árið er liðugt.



*Nú svartkjafturin fæst vestanfyri í føroyskum sjógvi, er stutt hjá skipunum at sigla til lands.*
*Fleiri íslendskir bátar hava landað í Fuglafirði seinastu tíðina.*

*Mynd: Jan Müller*



# Eitt grovt brot á rættartrygdina

**Løgmálaráðið brýtur rættartrygdina hjá Elektron og peningastovnunum, tá ið ein skipan, sum tey hava fingið loyvi til, verður jarðløgd. Tað heldur Kristian Magnussen, limur Javnaðarflokksins í Rættarnevndini. Hann vil hava løgmann og landsstýrismálanevndina upp í málið um Gjaldskipanina, so tað fæst aftur á rættkjøl**

GJALDSKIPAN

*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



Løgmaður og landsstýrismálanevndin eiga at fara inn í málið um Elektron og Gjaldskipanina og seta Høgna Hoydal landsstýris±mann upp á pláss.

Tað sigur Kristian Magnussen, løgtingsmaður og limur í Rættarnevndini hjá løgtinginum, sum er púra sannførdur um, at Høgni Hoydal sýnir ósaklig atlig í sínari stremban eftir at steðga Gjaldskipanini hjá Elektron og peningastovnunum.

Í fyrstu atløgu fekk Elektron loyvi frá Dátueftirlitinum til at fara undir Gjalskipanina, sum fór at virka tíðliga í fjør. Tað vildi Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, ikki lata sær lynda. Hann setti tí eina nýggja kunngerð í verk í summar, sum beinleiðis leggur eftir peningaflytingum hjá peningastovnunum. Í síðstu viku kom Dátueftirlitið til, at nýggja kunngerðin forðar nýggjum kundum og upplýsingum at koma í Gjaldskipanina. Sostatt er skipanin í roynd og veru steðgað hálvt annað ár eftir, at hon fór at virka.

– Hetta svarar til, at tú skalt byggja og fært byggiloyvi. Tá tú hevur fingið húsini upp at standa, men manglar vindeygu og hurðar, fært tú at vita, at tú sleppur ikki at byggja víðari. Tú mást gjarna búgva í húsunum, men sleppur ikki at gera tey liðug. Gjalskipanin kann heldur ikki koyra í hálvum gekki, sigur Kristian Magnussen.

Í kunngerðini frá 16. juni 2003 er farið beinleiðis eftir peningastovnunum, og allir aðrir stovnar, eru hildnir uttanfyri.

*Málið um Elektron og Gjaldskipanina er so álvarsligt, at løgmaður eigur at taka málið úr hondunum á Høgna Hoydal, sigur Kristian Magnussen*

– Hetta er grovt brot á alla rættartrygd, og landsstýrismaðurin hevur ikki umsitið á fullgóðan hátt. Eftirlitið við landsstýrismonnum liggur hjá løgmanni, og tí má hann taka sær av, at fáa málið aftur á rættkjøl. Tað álitið mugu vit hava á honum, sigur Kristian Magnussen.

Ger løgmaður einki, kann løgtingið reisa misálit á antin løgmann ella Høgna Hoydal. Men Kristian Magnussen ivast í, um tað loysir seg hjá andstøðuni, tí eitt misálit vendir til eitt álit, um tað verður felt í tinginum.

### Øðrvísi aðrastaðni

Tað er bara í Føroyum, at serligar treytir um flytingar uttanlands hjá eitt peningastovnum verða heftar upp í lógina um viðgerð av persónsupplýsingum. Hvørki í Íslandi, Noregi ella Danmark eru serlig atlit til flytingar hjá peningastovnum. Loyvt er at flyta persónsupplýsingar til trygg lond, og kunngerðirnar til lógirnar snúgva seg einans um undir hvørjum treytum, flytast kann til ótrygg lond.

Í Føroyum hava nøkur atlit sníkt seg inn, sum stava frá 1994, tá forðast skuldi peningastovnum at flyta edv-samskifti av landinum. Í hesum føri er ikki talan um trygd hins einstaka, sum er endamálið við lógini, men um vinnupolitikk, hevur Turið Debes Hentze, forkvinna í Dáturáðnum ført fram.

– Tað er púra burturvið, heldur Kristian Magnussen. Um vit skulu forða peningastovnunum serliga, so skuldu vit havt eina serlóg, har tað stóð svart upp á hvítt.

### Álit er ikki lóg

Kristian Magnussen viðgongur, at løgtingið hevur verið í so vinglut í málinum. Álitið til lógina um viðgerð av persónsupplýsingum nevnir peningastovnarnar og loyvir landsstýrismanninum at gera kunngerð, sum útgreinar lógina á hesum øki. Kortini er hann sannførdur um, at landsstýrismaðurin hevur borið seg skeivt at og fer at tapa málið í rættinum, um tað kemur so vítt.

– Eitt álit er ikki lóg. Tað hevur Hægstirættur fleiri ferðir tikið avgerð um. Gamaní loyvir hon landsstýrismanninum at gera eina kunngerð, men spurningurin er, um tað eru saklig atlit, sum Høgni Hoydal hevur tikið. Lógin sigur einki um peningastovnar ella Gjaldskipan. Lógin snýr seg einans um persónsvernd og ikki vinnuforðingar. Tí fer landsstýrið at tapa hetta málið, og tað verður skattgjaldarin, sum skal bløða, sigur Kristian Magnussen, løgtingsmaður.

# Løgtingið blásti við mjøli í munninum

**Í einum føri verður sagt, at persónsupplýsingar kunnu flytast til útlond, sum kunnu tryggja eina fullgóða viðgerð av upplýsingum. Aðrastaðni verður sagt, at ein kunngerð skal steðga útflutningi av persónsupplýsingum peningastovna. Løgtingið tosaði sostatt við tveimum tungum, tá lógin um viðgerð av persónsupplýsingum var fyri í tinginum**

ÚTGREINING

*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tað ber væl til at blása við mjøli í munninum. Tú skalt bara hava mjølið nóg leingi í munninum.

Líkt er til, at Løgtingið hevur roynt seg í hesi grein í málinum um Elektron og Gjaldskipanina, sum so nógv rok stendst um. Gjaldskipanin er steðgað, tí Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, í einari kunngerð er farin beinleiðis eftir peningastovnunum. Tað líkist serlóggávu, og tað verður vanliga ikki hildið at vera í samsvari við góða rættarsiðvenju, tá øll ikki eru líka fyri lógini. Men kunngerðin er í samsvari við lógina, sigur Dátueftirlitið, sum hevur steðgað Gjaldskipanini. Nú hevur Elektron stevnt.

Alt snýr seg um løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2003. Lógin hevur til endamáls at tryggja persónsvernd hins einstaka, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar, soleiðis at tær verða viðgjørdar við virðing fyri tí persónliga frælsinum og heimafriðinum og grundað á persónsupplýsingar við høgari góðsku.

Meginreglan er, at persónsupplýsingar skulu viðgerast í Føroyum. Men persónsupplýsingar kunnu flytast til útlond, sum kunnu tryggja eina fullgóða viðgerð av upplýsingunum, stendur í lógini. Perónsupplýsingar kunnu eisini flytast til útlond, um tann skrásett hevur givið loyvið til flutningin.

Hetta var orsøkin til, at Dátueftirlitið í fyrstu atløgu loyvdi Gjaldskipanini hjá Elektron og peningastovnunum. Í Gjaldskipanini verða sjálvvirkandi flytingar avgreiddar fyri fólk í samstarvi við PBS í Danmark. Upplýsingar fara til Danmarkar at venda, men av tí, at talan er um upplýsingar, sum ikki eru viðkvæmar, og at tær fara til eitt trygt land, sum Danmark er í hesum høpi, so gav Dátueftirlitið peningastovnunum loyvi til skipanina. Harafturat kemur, at tann einstaki samtykkir, at flytingarnar fara fram.

Men Høgni Hoydal, landsstýrismaður, vildi ikki lata sær lynda, at Gjaldskipanin hjá PBS kom í gildi í Føroyum, tí hann helt tað ikki samsvara við tað, sum løgtingið hevði álagt honum. Og verður hugt í lógina sæst, at Rættarnevndin hevði júst hendan spurningin á lofti.

Í álitinum til lógina sæst, at Rættarnevndin leggur áherðslu á, at allar edv-skráir skulu varðveitast og viðgerðast í Føroyum, og at forðast skal fyri, at peningastovnarnir flyta sítt edv-samskifti av landinum. Rættarnevndin sigur í álitinum, at landsstýrismaðurin beinanvegin og áðrenn lógin fær gildi, skal »seta greiðar reglur í kunngerð um flutning av persónsupplýsingum til útlond, herundir steðga ella avmarka útflutning. Rættarnevndin mælir til, at hendan kunngerð kemur til at fata um júst spurningin um at steðga útflutningi av persónsupplýsingum peningastovnanna.«

Við hesum broytingum helt Rættarnevndin, at politiski málsetningurin at veita borgarum bestu persónsvernd og politiski málsetningurin at fyribyrgja, at peningastovnarnir flyta sítt virksemi av landinum, varð rokkin.

Kortini gav Dátueftirlitið peningastovnunum loyvi at fara undir skipanina, til Høgni Hoydal smíðaði eina nýggja kunngerð, sum við vissu forðaði peningastovnunum at flyta upplýsingar av landinum.

Sostatt er líkt til, at løgtingið hevur vinglað í spurninginum um persónsupplýsingar. Í einum føri verður sagt, at upplýsingar kunnu flytast til trygg lond. Í øðrum lagi staðfestir Rættarnevndin, at ein kunngerð skal gerast, sum steðgar útlutningi av persónsupplýsingum hjá peningastovnum.